Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
Ítróttur: Jákup Mørk
Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin

Bústaður: Argjavegur 26, Argir
Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820 **Fax.** 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: P/F Prentmiðstøðin

Óheftir loftmiðlar

Oddagrein

SJÓNVARPIÐ og útvarpið skulu nú skipast sum tveir almenninir stovnar ella tvey almenn partafeløg, hevur landsstýrismaðurin í mentamálum, Torbjørn Jacobsen, boðað frá. Hann ætlar, at Løgtingið skal samtykkja eina nýggj kringvarpslóg, áðrenn ein nýggjur stjóri fyri sjónvarpið skal setast skal eftir Trónd Djurhuus.

GRUNDGEVINGIN hjá landsstýrismanninum er, at hesir „almennu“ tíðindastovnar skulu vera heilt leysir frá landsstýrismanninum í mentamálum og leysir frá almennu umsitingini. Tað skal eingin ivi sáast um, at útvarp og sjónvarp ikki kunna virka heilt frítt.

TAÐ kann ikki sigast annað, enn at hetta er skilagóð hugsan. „Pressan“ er ein av stólpunum í fólkaræðinum. Tað veri seg tann skrivaða pressan ella tann luftborna pressan. Uttan eina fría pressu er altíð vandi á ferð. Í øllum londum, har einaræðislyntir flokkar taka valdið, verður tann fría pressan steðgað.

VIT eru avgjørt ikki í eini slíkari støðu, men eftir at bygnaðurin varð broyttur og eftir at vit fingu eina nýggja kringvarpslóg, komu teir almennu fjølmiðlarnir at liggja beinleiðis undir landsstýrismanninum í mentamálum. Her skal ikki takast støða til, um tað hevur havt óhepnar avleiðingar ella ikki. Men vit kunnu spyrja, um útvarpið ella sjónvarpið høvdu viðgjørt nøkur mál, sum t.d. Signar á Brúnni hevði ábyrgdina fyri, øðrvísi, enn teir gjørdu. T.d. málið um kirkjulógirnar ella málið um sjónvarpið sjálvt. Í øllum førum er tað óheppið, at almennir fjølmiðlar liggja beinleiðis undir einum ráðharra, sum jú er politikkari.

ÍSTAÐIN ætlar nýggi landsstýrismaðurin, at ein nevnd skal hava ábyrgdina, eins og í einum partafelag. Hetta er óivað ein gongd leið, men so er eisini neyðugt, at nevndin er fullkomiliga óheft. Hon má hava skil fyri fíggjarviðurskiftum og vera tilvitandi um tíðindaflutning og programmviðurskifti.

EISINI mugu almennu fjølmiðlarnir liggja uttan fyri alla fíggjarliga uppiblanding. Tað eigur bara at vera so, at landsstýrið og fíggjarnevnd verða kunnað og taka fíggjarætlan og ársroknskap til eftirtektar. Klára stovnarnir seg ikki fíggjarliga, stendur stjórin til svars. Men tá tað er sagt, eiga fíggjarviðurskiftini at fáast upp á pláss - t.d. við játtan á fíggjarlógini - so stovnarnir sleppa undan at brúka tíð og orku upp á spøl og spennandi vinningar. Eydnast landsstýrismanninum at fáva eina nýggja lóg og skapt eitt betri fíggjarligt grundarlag er nógv vunnið á fjølmiðlaøkinum.

Sosialurin

Viðmerkingar:

Býráðið rekur nú fólkaflokspolitikk

Ansingartrupulleikin í Havnini hevur í mong ár verið stórur. Longu í 1987 samtykti býráðið at gjalda teimum mammum, ið sjálvar ansaðu børnum sínum heima eina viðbót, sum tá var 700 kr. fyri børn yvir 3 ár og 900 kr. fyri børn undir 3 ár. Tað var Fólkaflokkurin, ið tók stig til hetta, meðan hann sat í samgongu við Sambands- og Sjálvstýrisflokkinum.

Henda skipan helt fram til á heysti í ´93, tá Sambands-, Tjóðveldis- og Javnaðarflokkurin tóku hana av.

Í januar 1998 gjørdu Fólkaflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin samgongu. Tá fingu vit hesa skipan innførda aftur, nakað á sama hátt sum frammanundan. Henda skipan helt fram í umleið eitt ár, men so varð klagað til landsstýrið, og niðurstøðan var, at skipanin ikki var eftir galdandi reglum, og tí steðgaði hon upp.

Sitandi samgonga hevur nú rent seg fasta í ansingarspurninginum, eins og Fólkaflokkurin ávaraði um. Gleðiligt er kortini, at samgongan nú hevur samtykt at reka fólkaflokspolitikk á hesum økinum. Nú er gamla skipanin við at gjalda mammum at ansa eftir egnum børnum heima tikin upp aftur og snikkað so til, at samtyktin ikki brýtur lógina á økinum. Ætlanin er nú, at mammur fáa umleið 3000 kr. fyri børn undir 3 ár og 2800 kr. fyri børn yvir 3 ár. Foreldini skulu tó rinda 1050 kr. av hesum, so stuðulin verður ávikavist um 1750 og 2000 kr. fyri barnið. Hetta er umleið 2,5 ferðir so nógv sum eftir gomlu skipanini.

Hetta er gjørt nú, kanska sum valagn. Men løgið tykist tað kortini, at hetta verður skundað ígjøgnum júst nú, meðan heitastu talsmenn Fólkafloksins fyri hesum máli eru í farloyvi. Tað er ikki so langt síðani, at somu menn, sum nú samtykkja hesa skipan, hóttu við at slíta samgonguna, varð skipanin sett í verk.

Tað stutta av tí langa er kortini, at málið hjá Fólkaflokkinum nú verður pyntað og sett upp av javnaðar-, sambands-, tjóðveldis- og sjálvstýrissamgonguni.

Vinarliga,

Páll Petersen,
býráðslimur

Tjóvur trýr, at hvør maður stjelur –

sigur orðatakið, men í sambandi við greinina hjá Jóannes Eidesgaard í Sosialinum 9/9-2000 má hetta orðatakið umskrivast eitt sindur: Tann, sum brúkar ráðagerðarsnildir (konspirationsstrategi), heldur, at hini gera tað sama.

Vit hava eitt landsstýri, sum ið hvussu er í viðurskiftunum við Danmark hevur megnað at halda seg til reglurnar og vera siðiligt, hóast provokatiónirnar ikki tróta. At leggja Høgna Hoydal undir at hava til endamáls at fáa orrustu millum Føroyar og Danmark, og at leggja Annfinn Kallsberg undir at vera í lummanum hjá Høgna, tað er kanska gott tilfar til eina skemtitekning hjá Óla P. (– hevði hóskað til restina), men í einari politiskari viðmerking siga slíkir ógrundaðir pástandir ikki so lítið um hann, sum skrivað hevur.

Høgni Hoydal hevur lagt fram síni politisku og samfelagsligu sjónarmið í einari bók, sum kann keypast í hvørjum bókhandli: »Myten om rigsfællesskabet«. Ein væl skrivað og sera upplýsandi bók. Hon hevur fingið 1 – eitt – lítið ummæli í føroysku bløðunum og einki aftursvar. Bókin er tagd burtur. Ikki ein einasti hevur sakliga viðgjørt – ella afturvíst – tí, sum verður fført fram í »Myten om rigsfællesskabet«.

Tey, sum vilja hava kunnleika í staðin fyri gitingar um politisku kósina hjá Høgna Hoydal, kunnu t.d. lesa bók hansara. Øðrvísi er, um tú vilt vita nakað um politisku greiningar og ætlanir hjá javnaðarfólki í fullveldismálum. Hesi eru so upptikin av at finnast at mátanum, sitandi landsstýri arbeiðir uppá, at tey koma ongantíð so langt sum til at viðgera innihaldið – og enn minni at leggja fram sín egna politikk.

Greinin á síðu 2 í Sosialinum 9/9-2000 avdúkar einki sum helst um Høgna Hoydal ella landsstýrið. Men hon avdúkar framúr góðu gávurnar hjá Jóannes Eidesgaard til ráðagerðarsnildir – og so kunnu vit annars gera eins og hann og gita, hvat hann brúkar tær til!

Elin Henriksen

Tíðindaskriv frá samkomuni Rhema

Missiónsstevna

Jørn Hyldgaard

Í døgunum 15.-17. sept. 2000 fær samkoman Rhema í Havn vitjan av kenda danska prædikumanninum og pastorinum Jørn Hyldgaard. Hann hevur áður verið í Føroyum og hildið møtir, ið hava verið til stóra signing fyri nógv fólk.

Dagliga so er Jørn Hyldgaard pastor og leiðari fyri samkomuni Troens Ord í Brande og missiónsfelagskapi teirra nevndur INTO (INTERNATIONAL OUTREACH). Hesin felagskapur fyriskipar missiónsferðir, bólkatúrar, neyðhjálparsendingar, venjingarskúlar o.a.

Neyðhjálpararbeiði hjá teimum er eini 3 ára gamalt og tey arbeiða bæði í Hvítarusslandi, Bulgaria, Rumenia og Moldavia. Tey hava eina stóra neyðhjálpshøll, sum er 2000 m² til støddar. Ígjøgnum hetta arbeiðið hevur INTO upplivað stóra signing, og hjálpin hevur latið ótrúliga nógvar hurðar upp í samband við missiónsarbeiði teirra ymsastaðni, serstakliga í Austurevropa.

Hesa ferð er evnið: Missión og hvønn týðning hetta hevur í dag.

Annars er at siga um Jørn Hyldgaard, at hann er ein sera humoristiskur talari. Tú sleppur frá at keða teg á møtum hansara. Hann biður fyri sjúkum og ofta fær hann profetisk orð

Missiónsstevnan byrjar fríggjakvøldið kl. 8. Nærri verður lýst í bløðunum nær møtini verða.

Tøkk

Øllum tykkum, sum hjálptu og mintust, tá kæra kona, mamma, omma, vermamma og langomma okkara

BORGHILD JOENSEN
á Strondum

lá sjúk, doyði og fór til gravar, takka vit hjartaliga.

Familjunnar vegna
Kristjan

NATO kann tryggja tilbúgvingina

Bjarni Djurholm úr Fólkaflokkinum heldur, at Føroyar eiga at gerast limir í NATO sum skjótast. Hetta kundi givi› okkum eina væl virkandi tilbúgving. Afturfyri skuldu vit einas lati› NATO ymsar hentleikar í verjuhøpi í Føroyum



Bjarni Djurholm, landsst‡risma›ur, frøist um, at samgongan umsf›ir er samd um, at ney›ugt er vi› samstarvi vi› NATO

JOHN JOHANNESSEN

Stó› ta› til Bjarna Djurholm, landsst‡rismann úr Fólkaflokkinum, høvdu Føroyar fyri langari tí› sí›ani tiki› upp samband vi› NATO um eina samstarvsavtalu.

– NATO er trygdin fyri, at vit liva í einum tryggum vesturheimi, og tí haldi eg, at ta› hev›i veri› púra náttúrligt, at vit vóru limir í felagsskapinum, sigur Bjarni Djurholm.

Landsst‡risma›urin er grei›ur yvir, at hetta ikki er aktuelt í verandi ríkisrættarligu stø›u, men fáa vit eina n‡ggja skipan, har vit átaka okkum uttanríkispolitiska partin, heldur hann máli› avgjørt vera aktuelt.

Eisini ivast Bjarni Djurholm í, um vit yvirhøvur sleppa at vera uttan fyri verjufelagsskap, um vit fáa ábyrgdina á uttanríkispolitiska økinum.

Fleiri fyrimunir

N‡klækti landsst‡risma›urin vísir á fleiri fyrimunir, vit høvdu fingi› vi› NATO limaskapi. Millum anna› vísir hann á, at vit uttan hóvasták kundu fingi› eina væl skipa›a og væl virkandi tilbúgving innan NATO karmar.

– Føroysk bjargingarfelløg, Vaktar- og Bjargingartænastan og a›rir líkandi felagsskapir og tænastur kundu veri› meira samskipa›, undir nøkrum karmum, sum eru galdandi í NATO, heldur Bjarnir Djurholm.

Úrsliti›, heldur hann, hev›i veri›, at vit fingu væl virkandi verjuskipanir og tilbúgving, sum eru átakar teimum, vit kenna í londunum kring okkum.

Afturfyri skuldu vit einas lati› NATO ymsar hentleikar í verjuhøpi í Føroyum.

Føroyskur herur óney›ugur Hóast flestu limalondini í NATO hava her, heldur Bjarni Djurholm ikki, at ta› fer at ver›a ney›ugt vi› einum føroyskum heri.

– Men krevur NATO, at føroyingar eru vi› í hertænastu, ivist eg onga løtu í, at vit kundu gjørt samstarvsavtalu vi› danir, sigur landsst‡risma›urin.

Bjarni Djurholm roknar tó kortini ikki vi›, at NATO hev›i kravt hetta av okkum. Heldur roknar hann vi›, at NATO hev›i kravt, at vit settu land- og sjóøki av til venjingar og møguliga til verjustø›ir. Og ta› er eftir hansara fatan eingin trupulleiki.

Samrá›ingarnar oy›ilagt samskifti›

At danski uttanríkisrá›harrin, Niels Helveg Petersen, hevur s‡tt løgmanni at hitta Lord Robinson, NATO a›alskrivara, á máli um møguligan limaskap í Partnership for Peace, heldur Bjarni Djurholm vera orsaka› av fullveldissamrá›ingunum.

– Vit skuldu fyri langari tí› sí›ani havt umrøtt hetta mál vi› NATO. Nú er trupulleikin tann, at onnur áhugamál í sambandi vi› fullveldissamrá›ingarnar ver›a vavd upp í ynski føroyinga at tosa vi› NATO, og tí s‡tir uttanríkisrá›harrin løgmanni at koma á tal vi› NATO a›alskrivaran, sigur Bjarni Djurholm.

Ta› gle›ir kortini landsst‡rismannin, at ta› nú tykist vera brei› politisk undirtøka í samgonguni fyri stø›uni, Fólkaflokkurin hevur havt fyri samstarvinum vi› NATO fara mansaldurin.

40 milliónir eyka til almanna- og heilsumál

Tingi› skal í næstu viku vi›gera eitt eykajáttanaruppskot á 50 millónir frá landsst‡rismanninum í fíggjarmálum. 40 milliónir av hesum fara til lógarbundnar útrei›slur innan almanna- og heilsumál

JOHN JOHANNESSEN

Almanna- og Heilsumálast‡ri›, Strandfaraskip landsins og Oljumálast‡ri› fáa meginpartin av peninginum í eykajáttanaruppskotinum, Karsten Hansen, landsst‡risma›ur í fíggjarmálum, í næstum fer at leggja fyri tingi›.

Av teimum 50 millónum krónunum, uppskoti› ljó›ar uppá, fara 40 milliónir krónur til Almanna- og Heilsumálast‡ri›. Ta› mesta av hesum fer til lógarbundnar útrei›slur.

Strandfaraskip Landsins fáa 3,5 millónir á eykajáttanaruppskotinum.

Orsøkirnar til hetta eru tvær. Onnur er, at Skipas‡ni› hevur kravt, at Dúgvan og Tróndur økja manningartali› vi› tveimum monnum hvør. Talan er um GMDSS Radiooperatørar, sum Skipaeftirliti› metir vera ney›ugar umbor› á hesum skipum, tá uppgávurnar hjá yvirmonnunum orska› av lágum manningartali vera a›rar enn ta› vanliga radiosamskifti›, um skipi› kemur í ney›stø›u.

Lønin til hesar f‡ra mennninar ver›ur rokna› at liggja um eina millión.

Hin orsøkin er, at oljuprísurin er vor›in so høgur, at ta› er vor›i› d‡rari at reka strandfaraskipini.

Restin av eykajáttanaruppskotinum fer millum anna› til asfaltering av vegi til brennisstø›ina í Leirvík og til umsiting av láni hjá Realinum.

Eykajáttanaruppskoti› fyri september ta› fimta uppskoti›, Fíggjarmálast‡ri› hevur langt fyri tingi› í ár. Harafturat hevur tingi› samtykt eitt eykajáttanaruppskot á 6,3 millióni frá andstø›uni og tr‡ fíggjarnevndarskjøl.

Vikuskifti í
ABERDEEN
Vikuskiftis tilboð galdandi hósdag - mánadag

Skene House Rosemont
Prísir pr. persón um 6 fólk búgva saman kr. **2.310,-**

Thistle Altens***
Prísir pr. persón í dupultkamari kr. **2.710,-**

Copthorne Hotel****
Prísir pr. persón í dupultkamari kr. **2.950,-**

Vikuskiftistilboð frá Europcar
Frá fríggjamorgun - mánamorgun prísir úr kr. **1.044,-**

Nøkur tiltøk í Aberdeen í heyst

16 sept	Bob Dylan konsert
23 sept	Country Fair
23 sept	UU2 konsert
24 sept	Magic / Freddy Mercury Show
12 okt	Status Quo konsert
27 okt	Abbamania

Fótbóltur í heyst
Heimadystir hjá Aberdeen

09 sept	St. Johnstone
30 sept	Celtic
14 okt	Dundee
21 okt	Dunfermline

Atlantic Airways
TEL 333 900 - FAX 333 380